

## Ferguson misti talið

Alex Ferguson bað seint í dystinum tann fjórða útskiftaran gera seg kláran at fara á vøllin. Ferguson skifti í hálvleikinum Rio Ferdinand inn, og síðani komu eisini Paul Scholes og Patrice Evra á vøllin. Eftir hetta bað United-venjarin Alan Smith gera seg kláran at fara inn, men Smith minti Ferguson á, at hann hevði longu skift tríggjar spælarar inn, og so klárnaði hjá roynda venjaranum.

## Allback skoraði við ilini

Tað var ikki nakað dreymamál, sum avgjørdi dystin millum FCK og Manchester United. Eftir eina hornasparksstøðu endaði bólturin hjá svenska álopsspælaranum Marcus Allback, og hann fekk sent bóltin um málstrikuna.

- Eg royndi at taka bóltin á ristina, men eg rakti hann ístaðin undir fótinum. Men bólturin fór í málið, og so minnist eg ikki rættiliga, hvussu eg jublaði, eg var euforiskur, segði Allback eftir dystin.

# FCK sløkti stjørnurnar



*Málmaðurin Jesper Christiansen og verjuspælarin Brede Hangeland hálvsfevnast eftir sigurin á Manchester United*

*Mynd: Scanpix*

**Ensku heimsstjørnurnar kláraðu ikki at skora mál, og so vassaði ein svenskur álopsspælari inn í ævintýrið og skoraði sigurmálið, tá ið FCK vann sín helst størsta sigur nakrantíð**

CHAMPIONS LEAGUE

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

**(Keypmannahavn):** Tað var mest sum tikið úr einum ævintýri hjá H.C. Andersen, tá ið FC Keypmannahavn í gjárkvøldið skapti sensatión í europeiskum fótbólti og vann á stórfelagnum Manchester United.

Eingin hevði veruliga roknað við hesum undan dystinum. FCK hevur havt trupulleikar við at gera mál í undanfarnu dystunum, og í trimum royndum varð tað bert blivið til eitt stig undan stórdystinum ímóti United.

Og so var tað knappliga, at tað bar til hjá FCK. Danska stórfelagið, sum í europeiskum samanhangi ikki er stórfelag, lítur á eina sterka verju og ein góðan málmann, og so skulu teir skapa onkrar kjansir – millum annað við deyðbóltum.

Mikukvøldið vardi FCK væl stóran partin av tíðini, og sjey minuttir fyri tíð skoraðu teir eftir hornaspark. 1-0 til FCK, og so sløknaðu United-stjørnurnar í heystarkuldanum í Keypmannahavn.

### Ivaðust ikki í sigrinum

Hetta var næstan eitt klassiskt dømi um ein favoritt, sum ikki veruliga spennir seg út, tí roknað verður ikki við, at tað kann ganga galið. Og so hendir tað. Eitt sindur av óhepni, onkur minni feilur, og so er tað ikki so stuttligt meira.

Undan dystinum tóktust teir á liðnum hjá Manchester United rættiliga vísir í, at teir fóru at vinna. Venjarin royndi at gera tað til eina trupla uppgávu, men tað tóktist ikki serliga sannførandi. Spælararnir líktust ikki teimum mest spentu spælarunum, tá ið teir komu á vøllin til seinastu venjingina undan dystinum, og hóast teir royndu at lyfta seg sjálvar í sambandi við dysti, var tað heldur ikki nóg mikið.

Harafturat vóru fimm av stuðulsspælarunum uttan fyri – antin smáskaddir ella settir á beinkin fyri at hvíla.

### Tóku ikki sínar kjansir

Manchester United var tað betra liðið. Teir høvdu meira spæla og størru kjansirnar. Rooney hevði tveir góðar møguleikar at skora, Scholes og O'Shea hevði kanska størsta kjansin av øllum, men hann sendi fram við málinum.

FCK byrjaði dystin væl, trýstu í 10 minuttir og vóru væl við allan fyrra hálvleik. Í seinna hálvleiki gjørdist tað meira tungt, men teir royndu. Góðar sjey minuttir fyri tíð sendu teir horna inn fyri málið, og støðan endaði við, at svenski álopsspælarin Marcus Allback kom at standa leysur mitt fyri málið, og hann fekk onkursvegna oyst bóltin í málið til 1-0.

Hetta gjørdist eitt minniligt kvøld fyri FCK og danskan fótbólt. Nipnu United-stjørnurnar noyddust av vøllinum við ongum, meðan heimaáskoðararnir dansaðu og sungu av gleði, og FCK-spælararnir hálsfevndust á vøllinum.

## – Eg eri stoltur

**(Keypmannhavn):** FCK-venjarin var sum vera man sera fegin og errin eftir sigurin á Manchester United í Parkini mikukvøldið.

- Eg eri stoltur av, at spælararnir stríddust so hart fyri at vinna hendan dystin. Seinastu 10 minuttirnar orkaðu teir næstan ikki at ganga, men teir kláraðu at halda tætt. Eg eri stoltur av hesum sigrinum, hetta er ein stór løta fyri FCK, segði Ståle Solbakken.

– Dysturin var tættur, og vit vóru heppnir at vinna dystin. Tú mást verða heppin, um tú skalt vinna ímóti einum slíkum liði sum Manchester United, segði FCK-venjarin.

## – Vit høvdu tamarhald

**(Keypmannahavn):** Lagið var langt frá tað sama eftir dystin ímóti FCK, sum tað var dagin fyri dystin. United-venjarin, Sir Alex Ferguson, var vónbrotin eftir tapið ímóti FCK, og hann ásannaði, at fótbóltur er ikki altíð rættvísur.

– Eg gevi ikki nøkrum skyldina fyri hetta tapið. Vit hava tapt ein dyst, og tað er tað, segði Ferguson.

– Vit høvdu tamarhald á dystinum alla tíðina, men tað var eitt vónbrot, at vit ikki skoraðu og lótu eitt mál fara inn eftir horna. Vit vistu, at vit skuldu ansa væl eftir teimum í sambandi við deyðbóltarnar.

– Nú er okkara bólkur meira opin aftur, men um vit vinna næsta dystin ímóti Celtic, so hava vit vunnið bólkin, og tað er júst tað, sum vit ætla okkum, segði United-venjarin.